


# Mótaskálin og Skálabúðin

Mótaskálin og Skálabúðin í Dr. Jakobsensgøtu er nú sami handil við øllum til kvinnuna frá innast til uttast.

Eftir at Mótaskálin og Skálabúðin hava hildið til yvirav hvørjum øðrum í Dr. Jakobsensgøtu í 30 ár er Mótaskálin nú fluttur yvir um vegin og inn í Skálabúðina.

Nú er so alt savnað undir einum taki, og Mótaskálin hevur fingið betri pláss, góðar umstøður og eina flotta framsýning í somu hølum sum Skálabúðin við kendum vørumerkjum sum t.d. Wearhouse, Marc Lauge, 2-Biz, Ze-Ze og Repeat.

Handilin selur eisini kendu vørumerkini Brandtex, Zhenzi, Classic, Herluf Design, Dim og Eurofashion, umframt Triumph náttklæðir og pyamas í silki og bumull til allar aldursbólkar.

Til jóla hava Mótaskálin og Skálabúðin eitt stórt vøruúrval av klæðum til kvinnuna frá innast til uttast og bjóðar eitt megagott konsept til allar kvinnur.

# Fótbúni í miðbýnum og Miðlon




Ein av gomlu og kendu handlunum í Havn er Fótbúni, sum í dag hevur handlar bæði í miðbýnum og í Miðlon við Hoyvíksvegin.

Fótbúni er, sum navnið sigur, ein handil ið hevur spesialiserað seg í skótoyi og øðrum til kvinnur, menn og børn.

Til kvinnur og menn selur handilin skógvar og stivlar av merkjunum sum t.d. Mary B, Clarks, Up A Tree, ecco, Gabor og Ralph Boston umframt Levante sokkabuksir og taskur av ymiskum sløgum.

Til børn selur handlin skótoy av merkjum sum t.d. Viking, Bundgaard, ADI, Taxi og Btween.

Søgan um Fótbúna byrjar longu í 1947, tá Karl Joensen læt upp skósmiðju og handil við Villingardalsvegin í Havn. Í 1954 flutti handilin oman í Lucas Debesesargøtu, og í 1955 í Tróndargøtu, har handilin í miðbýnum framvegis er. Í september 2009 læt Fótbúni upp ein handil í Miðlon.

Í dag verður handilin rikin av triða ættarliði. Tað eru Bjarni og Súsan Joensen, sum eiga og reka Fótbúna.

Fótbúni í miðbýnum og Miðlon hava fingið nógvar vørur heim til jólasøluna og eru á tremur við nýmótans skótoyi til kvinnur, menn og børn eins og jólagávuhugskotum.

